# Fyrstir við hópfram-leiðslu av elbilum




Renault eru í fremstu røð, nú allar bilverksmiðjurnar kappast um at koma á marknaðin við reinum og orkusparandi bilum. Sum tað sær út í løtuni, verða Renault helst fyrstir við hópframleiðslu av elbilum. Renault byrja at selja elbilar í Danmark í 2011. Fyrsti elbilurin verður Renault Kangoo ZE. Í mun til vanliga Renault Kangoo er elbilurin annarleiðis uppbygdur bæði hvat designi og el-skipanini viðvíkur.

# Berg Motors selja nú Renault

Berg Motors er nú alment umboð fyri Renault í Føroyum. Franska Renault bilverksmiðjan er ein av teimum stóru í Evropa, eins og Renault eru nakrir av mest seldu bilum í Evropa

Programmið hjá Renault er rættiliga umfatandi. Teir gera bilar í øllum støddum, bæði persónbilar, vørubilar, lastbilar og bussar.

Renault eru kendir fyri trygdina í sínum bilum. Seinastu nógvu árini hava allir nýggir Renault fingið fimm stjørnur og hægsta karakter frá evropeisku EuroNCAP krasjtestunum. Teir eru eisini í fremstu røð, nú allar bilverksmiðjurnar kappast um at koma á marknaðin við reinum og orkusparandi bilum. Sum tað sær út í løtuni, verða Renault helst fyrstir við hópframleiðslu av elbilum.

Eisini viðvíkjandi designi er ein broyting við at hómast, bæði tann nýggi Scenic og Megane hava fullkomiliga broytt stíl við flottum og framkomnum designi, eins og teir eisini fáa toppkarakter fyri trygd og koyrieginleikar. Renault hava stórt úrval av bilum í øllum støddum, heilt frá tí minsta persónbilinum Renault Twingo til tann størsta Espace og í vørubilum frá Kangoo Express til tann størsta Renault Master.

Renault er ein av elstu bilverksmiðjum í heiminum, stovnað í 1899 í Fraklandi. Renault er høvuðspartaeigari í Nissan Motor Company, sum er tann triðstørsti japanski bilframleiðarin. Í dag eru nógvir Renault og Nissan bygdir yvir somu plattformar. Renault eiga eisini rumensku Dacia bilverksmiðjuna og Renault Samsung Motors í Suðurkorea.




# Tryggir Renault bilar

Renault eru kendir fyri trygdina í sínum bilum. Seinastu nógvu árini hava allir nýggir Renault fingið fimm stjørnur og hægsta karakter frá evropeisku EuroNCAP krasjtestunum. Euro NCAP stendur fyri “European New Car Assessment Programme”.

EURO NCAP
www.euroncap.com

*Seinastu nógvu árini hava allir nýggir Renault fingið fimm stjørnur og hægsta karakter frá evropeisku EuroNCAP krasjtestunum*